# Ann vann fyri bestu lýsing av G!

**Fyrsti vinnarin í kappingini hjá G! og eg.fo er funnin. Ann Reynstind Jøkladal vann fyrsta umfar við tekstinum "Og so segði man", har hon fortelur um sína uppliving av G! Festivalinum**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eg.fo skipar í samstarvi við G!Festival fyri at kapping við evninum: Lýs G!, tú skal lýsa hvussu tú upplivur at vera á G!?

Ongi mørk eru fyri, hvussu tú sigur frá. Um tað er við mynd, grafikki, teksti, ljóði. Tey, ið duga at lýsa sínar G!-upplivingar upp á besta mátan, vinna eitt festival pláss. Originalitetur og stuttligur hugsunarháttur eru leiðbeiningarnar frá eg.fo og G!, restin er upp til tey luttakandi sjálvi.

Ann Reynstind Jøkladal vann fyrsta umfar av kappingini fyri at skriva stuttligt og erligt um sínar G!-upplivingar, við orðingum, sum nú verða brúktar til íblástur í marknaðarføringini hjá G!

Øll innkomin uppskot verða mett, og tað allarbesta kann enda í lýsingum og kunning hjá G!

Tað eru fýra undanumfør yvir tveir mánaðar, og tann besta, flottasta, stuttligasta og/ella mest kreativa lýsingin verður kunngjørd aðru hvørja viku. Vinningur er eitt vikuskiftispass til G! Festival, ið er galdandi fyri allar festivaldagarnar. Annika skal seinni í finaluni kappast við hinar tríggjar finalistarnar um tjaldingarpláss, merchandise og eina fløgu við G! bólki

Um tað er hóskandi, verður lýsingin løgd út á G! heimasíðuna .

2. kappingarumfar er nú byrjað, og vilt tú vera við í tí, skal lýsingin sendast inn á eg@gfestival.fo í seinasta lagi fríggjadag 6. apríl.

Tað ber eisini til at senda lýsingina við postinum á:
G! Festival
Att: Kapping á eg.fo
Við Ánna 72
FO-512 Norðragøta

# Pet Shop Boys spæla í Bergen




**TÓNLEIKUR OG FERÐING**
*Tíðindaskriv*

Seinastu tíðina hevur tað eydnast at fingið nógv stór nøvn til Bergen. Seinasta stóra navnið, sum nú fer at vitja Bergen, eru popplegendurnar Pet Shop Boys.

Teir báðir Neil Tennant og Chris Lowe góvu mitt í 80´unum út slagarin West End Girls, og síðan hava teir, við sínum heilt serliga stíli, framleitt slagara eftir slagara.

Tey flestu munnu kenna sangirnar Go West, Rent, Heart, It´s a Sin og ikki minst Elvis- nummarið Always On My Mind. Nógv eru á einum málið um, at Pet Shop Boys útgávan av Always on My Mind er tann besta útgávan av sanginum nakrantíð.

Í heimlandinum Ongland hava teir ikki havt færri enn 20 sangir á topp 10 listanum seinastu 20 árini.

Teir hava eisini framleitt sangir fyri eitt nú Blur, David Bowie, Robbie Williams og Tinu Turner.

Í samband við at Pet Shop Boys tann 27. apríl trínur á pallin í Bergen skipar Smyril Line fyri konsertferð til Bergen við Norrønu. Farið verður úr Føroyum hóskvøldið tann 26. apríl og koma til Bergen fríggjadagin tann 27. apríl.

Fríggjakvøldið kl. 21.00 trína Pet Shop Boys á pallin í Grieghallen, sum liggur miðskeiðis í Bergen.

Norrøna siglur av Bergen sunnumorgun tann 29. apríl og er á Havnini mánamorgun 30. apríl.

## Ársaðalfundur

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í Suðuroyar Sparikassa P/F týsdagin 17. apríl kl. 19.00 í VB-húsinum, Vágur.

Dagsskrá:

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.

2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.

3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum.

4. Fráboðan frá Suðuroyargrunninum viðvíkjandi rætti grunnsins at tilnevna ein nevndarlim sambært § 14.

*Suðuroyargrunnurin hevur boðað frá, at hann fer at tilnevna ein nevndarlim.*

5. Val av nevndarlimum.

*Malfriður Danberg og Rógvi Thomsen standa fyri vali sambært § 14, stk. 2 og § 21, stk. 4 í viðtøkunum.*

6. Uppskot um viðtøkubroytingar.

a) Uppskot um at broyta § 3, stk. 1, 2. pkt., frá at vera soljóðandi: *"Hækkingin kann fara fram uttan fortekningsrætt fyri verandi partaeigarar felagsins, um so er, at hækkingin fer fram við umlegging av skuld, harundir skifti av ábyrgdarfæi til partabrøv, ella …Undantikið hesum hava verandi partaeigarar felagsins fortekningsrætt til tekning av nýggjum partabrøvum."* til at verða soljóðandi: *"Hækkingin kann fara fram uttan fortekningsrætt fyri partaeigarar felagsins, um so er, at hækkingin fer fram við umlegging av skuld, harundir skifti av ábyrgdarfæi til partabrøv til marknaðarkurs í hvørjum sambandi ábyrgdarar frítt kunnu velja at rinda møguligan yvirkurs við kontantum gjaldi, ella …Undantikið hesum hava partaeigarar felagsins lutfalsligan fortekningsrætt til tekning av nýggjum partapeningi."*

b) Uppskot um soljóðandi nýggja § 3, stk. 2: *"Umframt hækkingina sambært § 3, stk. 1, er nevndini heimilað, í tíðarskeiðinum fram til 31. januar 2011, at hækka partapeningin – í einum ella fleiri umførum – við samanlagt kr. 20.000.000,00. Partaeigarar felagsins skulu hava lutfalsligan fortekningsrætt. Tó kann nevndin gera av, at hækking skal fara fram uttan fortekningsrætt fyri partaeigarar felagsins, um talan er um kapitalhækking, sum verður útbjóðað í vanligari fríari tekning til marknaðarkurs."*
Verandi § 3, stk. 2, verður so § 3, stk. 3, og verandi § 3, stk. 3 verður § 3, stk. 4.

c) Uppskot um at broyta § 19 frá at vera soljóðandi:*"Roknskapir felagsins verða grannskoðaðir av tveimum av aðalfundinum valdum grannskoðarum. Ein skal vera løggildur, meðan hin skal vera løggildur ella skrásettur. Grannskoðararnir verða valdir fyri eitt ár í senn."* til at verða soljóðandi: *"Roknskapir felagsins verða grannskoðaðir av einum av aðalfundinum valdum løggildum grannskoðara. Grannskoðarin verður valdur fyri eitt ár í senn."*

7. Val av grannskoðan.

8. Ymiskt

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu felagsins í Vági. Eisini liggja fullfíggjaði uppskot um viðtøkubroytingar sambært pkt. 6 a), b) og c) frammi sum nevnt.

**Fyri at hava rætt til at møta á aðalfundinum skulu partaeigarar, fulltrúir og umboð fyri fjølmiðlar í seinasta lagi 12. apríl 2007 hava biðið um atgongumerki á deildum felagsins í Vági, á Tvøroyri ella í Tórshavn.**

Vágur, tann 28. mars 2007

NEVNDIN

SUÐUROYAR SPARIKASSI